# HERI VIRRUR



Mynd: Eyðbjørn Jacobsen

» Lívsgleði er eisini ein spurningur um val, og tú kanst velja at verða lukkuligur.

**STRONGD OG LÍVSGLEÐI**

Niclas Heri Jákupsson hevur týsdagin tveir fyrilestrar í Løkshøll í Runavík. Tiltakið kallast "Út við strongd – inn við lívsgleði".

Í fyrra fyrilestrinum greiðir Niclas Heri frá um, hvussu hann upplivdi at blíva sjúkur av strongd, og hvør munurin er á positivari og negativari strongd.

Í seinna fyrilestrinum fer Niclas Heri at hugleiða um lívsgleði, og um hvussu vit kunnu njóta lívið, læra okkum at hugsa positivt og útstrála gleði.

– Tá eg bleiv strongdur, bleiv eg kvirrur, segði lítið og einki, og tey, sum kenna meg, vita, at mær dámar væl at práta. Meg eg broyttist frá at verða on og prátingarsamur til at verða off og tigandi, sigur Niclas Heri Jákupsson